## Skeiðupplýsingar

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar** | 6910.22 |
| **ECTS** | 15.00 |
| **Heiti** | Skeið í starvslæruvegleiðing og akkersfólkauppgávuni – læraraútbúgvingin |
| **Fortreytir** | Læraraprógv og 2 ára starvsroyndir |
| **Endamál** | Endamálið við skeiðnum er at gera tann lesandi føran fyri (1) at vegleiða læraralesandi, ið koma í starvslæru og (2) at leiðbeina nýútbúnum lærarum fyrsta undirvísingarárið. |
| **Innihald** | Skeiðið er í 9 sjálvstøðugum og tó samanhangandi pørtum. Partarnir eru hesir:<br><br>- Hin føroyski fólkaskúlin og hin føroyska læraraútbúgvingin<br>- Læraraútbúgvingin í 2020unum<br>- Góð undirvísing og góðir undirvísarar<br>- Almendidaktisk temu og almendidaktiskar avbjóðingar<br>- Fakdidaktisk temu og fakdidaktiskar avbjóðingar<br>- Vegleiðingarástøði og ástøði um akkersfólkaskipanir<br>- Etisk atlit í sambandi við vegleiðing og eftirmeting<br>- Starvslæran sum eitt serligt lærurúm í læraraútbúgvingini<br>- Avbjóðingar hjá nýútbúnum lærarum |
| **Læru- og undirvísngarhættir** | Vit undirvísa triðja hvønn hósdag.<br>Vit nýta fyrilestraundirvísing, samstarvslæru, bólkaarbeiði, greining av casum, kjakbólkar, upplegg frá skeiðsluttakarum, stutt skrivlig avrik, sjálvlestur, Zoom-fyrilestrar osfr. |
| **Læruúrtøka** | Tá ið skeiðið er lokið, skal tann lesandi verða førur fyri at<br><br>- greiða frá, hvussu læraraútbúgvingin er skipað, og hvønn leiklut starvslæran og starvslærarin hevur í samlaðu útbúgvingini<br>- gera mun á ymiskum vegleiðingar- og mentorástøðum og hættum, og taka støðu til, nær ein vegleiðingartilgongd er betri egnað enn ein onnur<br>- lýsa hvørjar avbjóðingar starvslesandi og nýútbúnir lærarar ofta hava, tá ið tey skulu skipa undirvísingina<br>- meta um, hvørjar førleikar lesandi/nýútbúnir lærarar hava, tá ið tað snýr seg um (1) at leiða ein flokk, (2) at skapa gott samband við einstaka næmingin í flokkinum, og (3) at skapa eina innihaldsríka og næmingalagaða undirvísing<br>- skipa fyri konstruktivum ráðleggingartímum/akkersfólkasamrøðum, har ið týdningarmiklir partar av lærarastarvinum fáa umrøðu<br>- eftirmeta undirvísingina hjá læraralesandi og nýútbúnum lærarum og at orða ítøkilig tilmæli. |
| **Próvtøkuháttur** | Próvtøkan er tríbýtt<br><br>(1) Tey lesandi skulu hava læraralesandi í starvslæru, meðan skeiðið gongur og dokumentera, hvussu tey hava skipað samstarvið frá byrjan til enda. Hetta arbeiðið skal verða góðtikið av undirvísarunum, áðrenn endaliga uppgávan verður skrivað<br><br>(2) Tey lesandi skulu skriva eina stutta akademiska uppgávu (7-10 blaðsíður), sum tekur støði í einum ella fleiri avbjóðingum, ið eru tengdar at starvslæruvegleiðaraleiklutinum og/ella leiklutinum sum akkersfólki. Teksturin skal leggjast fram munnliga.<br><br>(3) Framløgudagin fáa skeiðsluttakarnir til uppgávu at vera opponentar hvør hjá øðrum. |
| **Próvdøming** | Innanhýsis |
| **Próvtalastigi** | staðið/ikki staðið |
| **Lestrarlisti** | Bókmentalistin verður latin teimum lesandi, áðrenn skeiðið byrjar |
| **Stig** | Bachelor |
| **Ábyrgd** | Hans Harryson, email: hansh@setur.fo |

## Course information

| | |
|---|---|
| **Course number** | 6910.22 |
| **ECTS** | 15.00 |
| **Title** | Course in practice guidance and mentoring – teacher training |
| **Prerequisites** | |
| **Learning outcomes** | |
| **Examination** | Internal |
| **Grading scale** | Passed/Not Passed |
| **Level** | Bachelor |
| **Contact** | Hans Harryson, email: hansh@setur.fo |